FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA

# Í heyst bjóðar Fróðskaparsetur Føroya skeið í føroyskum

Tú lærir at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt í arbeiði og gerandislívi

**Lærari:** Lena Reinert

**Tíðarskeið:** 31. aug. - 18. nov. 2009. mánadag og mikudag, kl. 09.00 - 11.30 leygardagin 3. oktober kl. 09.00 - 14.30

**Próvtøka:** 23. og 25. november 2009

**Fortreytir:** Skeiðið er ætlað teimum, ið hava føroyskt á miðnámsskúlastigi ella samsvarandi

**Tilmelding:** Tilmeldingarskjal finnur tú á www.setur.fo

**Tilmeldingarfreist:** 17. august 2009

**Skeiðsgjald:** kr. 4.000,00

Næmingatalið er avmarkað. **Gjaldast skal í seinasta lagi við skeiðsbyrjan**

**Skeiðs- og próvtøkugjald:** konto 9870 428.097.1, í Suðuroyar Sparikassa, viðm. navn og skeið

**Skeiðsstaður:** Fróðskaparsetur Føroya, Jónas Broncks gøtu 25, 4.hædd, 100 Tórshavn

Upplýsing um skeiðið: Setursskrivstovan, tlf. 352500 ella setur@setur.fo

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.



**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**

**Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14**
**Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo**



Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · tel: 358888 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo

# Mekanikari søkist til Bilrøkt

**Vegna økt virksemi, søkir Bilrøkt eftir mekanikara í fast starv at byrja sum skjótast.**

**Starvið fevnir um**
- Eftirlit av akførum
- Smærri umvælingar
- Dekkskift
- Klárgerðan av akfør til sýn v.m.

**Førleikakrøv**
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Koyrikort til lastbil, er ein fyrimunur
- Góðan røkjuskap
- Kundavinarligur

**Setanartreytir** verða sambært avtalu

**Umsóknir** skulu sendast til:
Bilrøkt, Stiðjagøta 3, Postboks 1234
FO-110 Tórshavn

BILRØKT
*Borgar fyri góðsku...*

Fá meira at vita um starvið við at venda tær til Heina á Borg á tlf. 235888 ella t-post: heini@bilrokt.fo

**Bilrøkt**
Ivaleyst størsta arbeiðsøkið hjá Bilrøkt er bilvask. Tað var eisini júst bilvask, ið var grundarlagið undir fyritøknuni, tá ið Bilrøkt bleiv sett á stovn.

Bilrøkt er eisini farið undir at hava bilverkstað. Vit skifta bremsur, útstoyt o.a. Eisini hava vit nýmótans dekk / avbalanseringsmaskinur og rustviðgerð.

Bilrøkt hevur í dag 3 flutningsbilar sum eru standby 24 tímar um døgnið, at hjálpa kundum, sum eru komnir illa fyri við bili sínum.

Eitt stórt virkisøki hjá Bilrøkt í dag eru leigubilarnir. Bilrøkt hevur lagt seg eftir at hava góðar og bíligar leigubilar, har kundin kennir seg tryggan við bilin.

Bilrøkt selur eisini brúktar bilar hjá sær sjálvum og fyri kundar.

Sjónband 357774



# Fiski-, ríði-, gongu- og kampingtúrar







Lómundaroyran norðanfyri Vestmanna er eitt tað náttúruvakrasta øki í landinum. Friðsælan við vøtnini millum høgu fjøllini er framúr.

Marglætishúsvognar okkara eru eitt frálíkt útgangsstøði til fiskiferðir ella hagatúrar; til gongu ella á hestbaki.

**FISKING & FRÍTÍÐ**
Tel. +298 289001/+298 424001
fiskogfritid@email.fo / www.fiskogfritid.com

www.taks.fo

TAKS

# KT-leiðari

**Ert tú** til eina avbjóðing?

**Hetta starvið** setur krøv til tín kunnleika, eldhuga og kreativu evni.

**Tú verður** leiðari fyri netfyrisitingini hjá TAKS. Fýra fólk starvast á KT-deildini hjá TAKS, tú verður leiðari hjá teimum, men tú verður eisini partur av felags netfyrisitingini í Fíggjarmálaráðnum, sum húsast á Argjum.

**Tú fært** ábyrgdina av dagføringum, viðlíkahaldi av KT-skipanunum og okkara KT-netumhvørvi. Tú fært eisini ábyrgdina av KT-trygdini.

**Tú kemur** saman við leiðsluni á TAKS at gera langtíðarætlanir og seta mál fyri KT-eindina. At samskipa KT- menningina á øllum stovninum. At leggja til rættis og leiða KT-verkætlanum. At røkja samstarvið við uttanhýsis KT-veitarar. At umsita og skjalafesta infrakervið.

**Vit vænta**, at tú hevur viðkomandi útbúgving. Kanst tú vísa á royndir sum leiðari og verkætlanarleiðari, er hetta ein fyrimunur.

Eisini vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir og dugir væl at arbeiða í toymi. At tú dugur væl at skipa arbeiði, hevur fokus á loysnir og megnar at taka avgerðir.

**Starvið verður lønt** sambært sáttmála millum landstýrið og viðkomandi yrkisfelag. Møguleikar eru fyri eftirútbúgving.

**Meira fæst** at vita um starvið við at venda sær til Eyðun Mørkøre, settur stjóri, á telefon 352600, ella undanfarna KT-leiðaran, Fróða Danielsen á telefon 216884.

**Send umsókn** saman við avritum av prógvum, ummælum og CV til TAKS í seinasta lagi 3. august 2009, kl 15.00. Merkt: umsókn KT-leiðari.

**T-postur:** taks@taks.fo ella **Postadressa:** TAKS · Postsmoga 2151 · FO-165 Argir

**TAKS** er ein stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at umsita toll- og avgjaldsskattalóggávuna og innheintingar innan málsøkini hjá stovninum. **TAKS** hevur 135 starvsfólk og er skipað við einari høvuðseind á Argjum og trimum skrivstovueindum runt landið.